Viðskerin
Nr. 30 • Leygardagur 12. februar 2000
Góður vikuskiftislesnaður

# Har náttúran fær orð og menniskjaligar eginleikar

**Skaldsøgan »Dalurin fagri« er ein lýsing av, hvussu ein smádrongur upplivir gerandislívið á bróstsjúkrahúsinum. Hvussu hann upplivir tuberklasjúklingar og avmarkingar teirra, arbeiðsfólkið, læknan, smittuvandan og ikki minst pápa sín, sum alla tíðina má stríðast og strevast, fyri at alt skal hanga saman. Skaldsøgan er samstundis ein øðrvísi skaldsøga, ið stundum sveimar millum bundið og óbundið mál, ið gevur náttúrini orð og menniskjaligar eginleikar, sum streyma ígjøgnum hugan hjá lítla Pálli**



Gunnar Hoydal hevur við skaldsøguni *Dalurin fagri* skrivað eina nýskapandi og spennandi skaldsøgu. Bæði søguligi og skaldsligi íblásturin man í stóran mun vera heintaður frá pápa rithøvundans Karsten Hoydal, men Gunnar megnar á frálíkan hátt at geva skaldsøguni ein sjálvstøðugan og óheftan dám





PÁLL ISHOLM
ummælir
skaldsøguna
»Dalurin fagri«

»Dalurin fagri er skaldsøga um drongin Páll, ið veksur upp millum tey sjúku á bróstsjúkrahúsinum. Søgan tekur við um várið, tá ið gentan Sigrid kemur í dalin, har sjúkrahúsið stendur, og endar summarið eftir, tá ið hon verður førd úr aftur dalinum.«

Soleiðis verður sjálvur karmurin um skaldsøguna lýstur á innkápuni, og hetta er gott at hava í huganum, tá tú lesur bókina, tí hon er brotakend og stykkjað saman av 24 pørtum. Hetta hevur sínar fyrimunir og vansar.

Ein vansi er, at lesarin hevur lætt við at missa søgutráðin, og harvið fella frá. Hinvegin skapa brotakendu partarnir eina søgu, ið kann spæla uppá nógvar streingir samstundis, og harvið skapa eitt fjølbroytni, sum í sjálvum sær er spennandi.

Tað skal tó sigast, at tað serliga er fyrri helmingur av bókini, sum er brotakendur.

*Dalurin fagri er skaldsøga um, hvussu drongurin Páll upplivir lívið á bróstsjúkrahúsinum. Frásøgnin er brotakend og full av myndburðum, ið stundum sveima millum bundið og óbundið mál, og setir hetta krøv til lesaran*

Í seinna helmingi gerst frásøgnin meira samanhangandi, og endin er ein sonn perla, sum sameinir allar træðrirnar á ein hugkveikjandi hátt.

### Upprunin

Tað er neyvan nakar, sum ivast í, at sjálvur upprunin til søguna eru barnaárini hjá pápa rithøvundans, Karsten Hoydal, og haðani man íblásturin til nógvar av hendingunum vera heintaður. Hetta hevur fyri so vítt ongan stórvegis týdning fyri metingina av skaldsøguni.

Torført er tó hjá einum føroyskum lesara at slíta seg leysan av hesi vitan, og sostatt gera eina óhefta meting av lívinum í dalinum og býinum handan hálsin.

Hetta skapar tveir hættir at lesa skaldsøguna uppá. Annar, og tann sum flestu føroyingar helst fara at nýta, er tann staðbundni siðsøguligi, hóast hetta neyvan er tann mest gevandi. Hin er tann óhefti skaldsligi lesihátturin, ið eftir mínum tykki kanska ikki er so torførur hóast alt, tí Gunnar megnar á frálíkan hátt at geva skaldsøguni ein sjálvstøðugan og óheftan dám.

Skaldsøgan kemur kanska ikki til sín rætt fyrrenn hon verður týdd og lisin av lesarum, sum ikki hava tilknýtið til Bróstsjúkrahúsið og Havnina, og ikki kenna bakgrundina hjá rithøvundinum. Í so máta kunnu vit kanska siga, at hon ikki er skrivað beinleiðis til søguhugaða føroyska lesaran, men roynir at slíta seg leysan av staðbundna umhvørvinum og tala til eina breiðari lesarafjøld.

### Orðini

Vert er at leggja til merkis heitini á ymisku pørtunum, ið allir verða kallaðir við einum orði. Orðið er karmurin um einstøku partarnar, og tað eru líkasum hesi orðini, sum skapa hugarenslið hjá Pálli, og harvið sjálva søguna. Tá tú lesur skaldsøguna eru heitini verd at hava í huganum, tí tey geva einstøku pørtunum eitt meira viðkomandi innihald, enn undirheiti vanliga geva.

Tað er eisini í hesum orðum at hugurin rennur aftur á yrkingar eftir Karsten Hoydal og ta dialektisku lívsfatanina. Í hesi lívsfatan eru tað nevniliga mótsetningar so sum lív og deyði, ljós og myrkur, summar og vetur, ið skapa menning og vón. Móti endanum av bókini undirbyggja partarnir *Sigur, Vón* og *Vár* hesa lívsfatan.

Eisini hóma vit eina tulking av upprunanum til skaldskapin hjá Karstini. Vit kunnu møguliga siga, at skaldsøgan *Dalurin fagri* er hugleiðingar um 24 orð, sum vóru lyklaorð í lívinum á bróstsjúkrahúsinum og somuleiðis lyklaorð í skaldskapinum hjá Kartini Hoydal, og við skaldsøguni gevur Gunnar hesum orðum nýtt lív.

### Myndirnar

Skaldsøgan er á tremur við myndburðum. Myndirnar eru fyri tað mesta heintaðar frá náttúruni og mannakroppinum. Náttúrumyndirnar eru kanska ikki so nýskapandi og annarleiðis enn vit hava sæð áður, men royndin at nýta mannakroppin sum myndburð, og samantvinna hann við náttúruna á tann hátt, Gunnar ger, er nýskapandi, og ikki sørt spennandi.

Hetta skapar m.a. ein óhugna, ið gevur sjúkuni, smittuvandanum og umhvørvinum sum heild, eina víðari merking. Tó tykjast lýsingarnar av og á óneyðuga drúgvar, men tað veldst sjálvsagt um eygað sum sær.

Í drúgvu og námreiniligu lýsingunum tykist málið stundum sveima á einum marki millum bundið og óbundið mál, og neyðugt er at steðga á og møguliga lesa brotið umaftur, og er hetta óheppið fyri sjálva søgugongdina.

### Nakað nýtt

Skaldsøgan er neyvan tað, ein søguhugaður føroyingur hevði hugsað sær. Tann lesarin, ið væntar eina lætta og skjóttlisna skaldsøgu um eitt syndarligt skeið í Føroya søgu, verður helst vónbrotin og gevst kanska tá hálvthundrað síður eru lisnar.

Men lesarin, sum hevur dirvi at halda fram, og ikki óttast drúgvar lýsingar og hugkveikjandi myndburðir, og sum samstundis hevur stundir at steðga á, verður ikki skuffaður. Bókin er nevniliga full av beinraknum myndburðum og eyðleiðingum, ið geva skaldsøguni lív og ætlan. Ímóti endanum mennist sjálv frásøgnin almikið, og skapar hetta eina heild í eini annars brotakendari skaldsøgu.

Skaldsøgan *Dalurin fagri* er nakað nýtt og øðrvísi í føroyskari skaldsøguskriving, ið kanska ikki vinnur frama her og nú, men man við tíðini fara í søguna sum ein av teimum nýskapandi og góðu føroysku skaldsøgunum.

